F. S. F.
27 SEP 2007
Móttikið

AGANEVNDIN

**KÆRA 07/2007**

| *FSF skrivstovan upplýsir Aganevndini:* | |
|---|---|
| **Málsheitið: Kæra frá B68 um ólógligan leikara hjá FS Vágar 2004** | |
| Deild: 2. deild, menn | Kapping: Landskapping |
| Brot framt: 09.09.2007 | Kæra innkomin: 10.09.2007 |
| Kærugjald goldið: Ja □ Nei □ | Kærufreist hildin: Ja X Nei □ |
| Partshoyring við 5 daga freist: Ja □ Nei □ | Ummæli frá Starvsnevndini: Ja □ Nei □ |
| Partshoyring við 3 daga freist: Ja □ Nei □ | Áheitan um munnliga viðgerð: Ja □ Nei □ |
| Fordømi og úrskurðir: Ja □ Nei □ Kanska □ | |
| Yvirlit yvir skjøl o.a. próvtilfar í kærumálinum:<br>1) Kæra frá B68<br>2) Avrit av dómaraseðilinum<br>3) Frágreiðing frá FS Vágar 2004 | |

# AGANEVNDIN

**1. Kærupástandir og grundgeving fyri kæruni**

B68 vísir á, at leikari nr. 9 hjá FS Vágar, Eli Falkvard, er ov ungur at leika í vaksnamannadeild.

**2. Heimildir hjá Aganevndini at viðgera málið**

Sambært grein 2 og grein 5 í Agareglugerð FSF's, sum samtykt á aðalfundi FSF's 3. mars 2007, hevur Aganevndin heimild at viðgera mál um brúk av ólógligum spælarum.

**3. Fakta í málinum**

Sambært dómaraseðilinum leikti Eli Falkvard sum leikari nummar 9 hjá FS Vágum í dystinum í 2. deild hin 9. sept. FS Vágar 2004 hevur í síni frágreiðing váttað, at felagið gjørdi brúk av ov ungum leikara í dystinum fyri at kunna manna lið til dystin móti B68.

**4. Møgulig brot á lógir og reglugerðir hjá FSF sambært kærupástandum**

Grein 4, litra A í Kappingarreglum FSF's hevur áseting um aldursmark fyri luttøku í vaksnamannadeildum hjá monnum. Sambært ásetingini skal leikari vera fyltur 16 ár.

**5. Staðfestingar, metingar, o.t.**

Aganevndin staðfestir, at Eli Falkvard ikki lýkur aldurskravið sambært grein 4, litra A. Brúk av ov ungum leikara í landskappingardysti gongur ímóti grein 4, litra A í Kappingarreglunum og er tí ólógligt.

**6. Linnandi ella herðandi umstøður, ið hava týdning fyri metingina av málinum**

Hóast FS Vágar hevur viðgingið sítt mistak við at brúka ein ov ungan leikara, skal hetta hvørki verða linnandi ella herðandi fyri niðurstøðuna í málinum.

**7. Revsimøguleikar sambært lógum og reglugerðum FSF's**

Grein 8 í Aganevndarreglugerð FSF's heimilar Aganevndini at geva feløgum og persónum sekt fyri brot á lógarverk FSF's. Brúk av ólógligum spælarum er álvarsligt brot á lógarverk FSF's og ta skipan, ið er gjørd fyri brúk av spælarum.

## AGANEVNDIN

**8. Týdningur av møguligum fordømum og úrskurðum í líknandi málum**

Fordømi eru um, at brúk av ólógligum spælarum verður sektað við, at felagið verður dømt at tapa dystin. Aganevndin metir, at síggjast kann ikki burtur frá líknandi fordømum.

**9. Niðurstøða**

Aganevndin staðfestir, at FS Vágar hevur brotið grein 4, litra A í Kappingarreglum FSF's við tað at felagið hevur gjørt brúk av leikara í landskappingardysti í vaksnamannadeildini hjá monnum, sum ikki er fyltur 16 ár.

**10. Úrskurður**

FS Vágar 2004 verður dømt at tapa dystin móti B68 0-0 fyri brúk av ólógligum spælara, samanber grein 40 í Kappingarreglum FSF's.

**11. Upplýsing um kærumøguleika og freistir.**

Upplýst verður, at avgerð Aganevndarinnar um, at FS Vágar skal tapa dystin kann kærast til Yvirkærunevndina sambært grein 12 í Agareglugerðini. Kærast skal innan 5 dagar aftaná at úrskurðurin er móttikin.

**12. Staður, dagfesting og undirskrift Aganevndarinnar:**

**Tórshavn 27 / 09 - 2007**

Anni á Hædd, formaður